Runavíkar Kommuna
søkir eftir

## Pedagogi til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
• 1 pedagogi 25-30t um vikuna, til stovuna við børnum við serligum tørvi

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið á serstovuni verður sett 1. mars 2008 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 20 februar 2008, kl. 12.00.

***Runavíkar Kommuna***
***Heiðavegur 26***
***Postrúm 139***
***FO-610 Saltangará***

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur, 1 barnagarðsstova við 6-ára gomlum børnum og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

# FTS Timbur

**Alt timburarbeiði verður gjørt.**
**Serkønir í DECRA tøkum.**

**FTS Timbur**
**Tel 28 12 82**
**ftstimbur@ftstimbur.dk**

www.ognir.fo
íbúðir | sethús | vinnubygningar

# ÆTTARSTEVNA

Eini 30 fólk koma, í summar, heim úr víðu verð, at síggja Koltur og hitta skyldfólk.

Tey eru øll eftirkomarar hjá hesum 5 systrunum úr Koltri:

1) Elsebeth Hansdatter (Elsupa), fødd 1818. Gift við Kaldbaksjógvan, bónda, í Koltri.
2) Lisa Malena Hansdatter, fødd 1820. Gift við Jógvan í Skemmuni, bónda, á Sandi.
3) Anna Katrina Hansdatter, fødd 1823. Gift við Hans í Fjósi í Havn.
4) Maren Frederikka Hansdatter, fødd 1825. Gift við Hans Paula undir Kletti í Havn.
5) Nicolina Hansdatter, fødd 1832. Gift við »gamla Zakaris« í Skopun.

Miðað verður ímóti, at skipa fyri eini samkomu fyri ættini tann 2. august 2008. Vónandi ber til hjá nógvum eftirkomarum í Føroyum at luttaka.

Gerið so væl at siga frá hjá einum av hesum fyriskiparum áðrenn 1. mars 2008.

| | |
|---|---|
| • Elis Poulsen | Tlf. 361041 |
| • Birgith av Lofti | Tlf. 312045 |
| • Kirstin Lindberg | Tlf. 314202 |
| • Hjørdis Joensen | Tlf. 317289 |
| • Eyðfinnur Stórá | Tlf. 361344 |
| • Halldóra Poulsen | Tlf. 361282 |
| • Fríðhild Winther | Tlf. 361665 |
| • Odmar Hentze | Tlf. 361974 |

Tá vit vita talið av áhugaðum, verður skrá og tekningarlisti kunngjørdur.

EIÐIS KOMMUNA
Brekkuvegur 22 · 470 Eiði

## Navnakapping

**BARNAGARÐURIN** á **Eiði** skal hava navn og verður í hesum sambandi útskrivað navnakapping.

Uppskotini skulu skrivast á ein lepa og leggjast í ein brævbjálva við frámerki á. Gott hevði verið, um ein frágreiðing fylgir við um, hví júst uppskotna navnið er hóskandi til barnagarðin.

Avsendari skal ikki skrivast á brævbjálvan.

Í ein annan brævbjálva, við sama frámerki, skal navn og bústaður á tí, ið eigur uppskotið skrivast.

Merkið brævbjálvan "Navnakapping".

Ein trímannanevnd tekur støðu til uppskotini og tilskilar sær rætt ikki at brúka nakað uppskot.

Tríggjar virðislønir verða lætnar: Nr. 1: kr. 3000 – Nr. 2: kr. 2000 – Nr. 3: kr. 1000 Uppskotini skulu verða komin á kommunuskrivstovuna í seinasta lagi 06.03.08, kl. 12.00

**Vestmanna Skúli**
Toftavegur 12 · FO - 350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 470100 · Fax: 470101 · vestmanna@skulin.fo

# LÆRARASTARV í Vestmanna Skúla

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv, 25. mars - 30. juni 2008, fyri lærara í barnsburðarfarloyvi. Tímatalið um vikuna er 25

• Handverk og list í 1., 2., og 3. fl.
• Kristni í 3. og 7. fl.
• Stuðul í 4. fl í donskum og rokning
• Danskt 5. og 7. fl.
• Týskt í 8. fl.

Starvið er parttíðarstarv og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Nærri upplýsningar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 230100, ella frá varaleiðaranum Erling Munck Pedersen, tlf 470102 ella 230101.

Umsóknir saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 3. mars. 2008.

**Í Vestmanna skúla** eru 204 næmingar og 21 lærarar.
Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/
Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir annars í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.

# Dansiskeið
## í Rock´n roll

**5 mikukvøld á rað í fimleikarhøllini á Læraraskúlanum.**

Fyri vand ella fyri tey sum hava dansa áður, mikukvøld kl. 19.00 – 20.30.

Vit byrja í morgin, 13. februar.

**Kostnaður 180,- kr.**

Øll eru vælkomin
(støk / pør, ung og eldri)

**Tilmelding hjá Marilyn á tlf. 26 38 45**



***Kom og Dansa***